# FERÐIST Í FØROYUM á torginum í SMS



Framsýningin hjá Ferðaráðnum á torginum í SMS heldur fram leygardagin aftrat. Framsýningin er liður í herðferðini at fáa føroyingar at ferðast í Føroyum. Á torginum ber til at kunna seg um allar teir møguleikar man hevur sum ferðamaður í Føroyum. Umboð fyri økisferðavinnufeløgini (Kunningarstovunar) kring landið verða eisini at hitta á torginum.





Hjá Føroya Sparikassa hava allir brikkar týdning. Stórir sum smáir. Nú sóknast vit eftir nýggjum týðandi brikkum soleiðis, at putlispæl okkara skal ganga upp.

Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Vit vænta, at tú ert lívlig/ur og óhátíðarlig/ur. Tú ert ein eldhugaður bólkaspælari og kennir, at sjálvsábyrgd og góð tillagingarevni skapa íblástur.

Vit vilja skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast. Vit leggja serstakliga dent á opið og ærligt prát. Tað er við til at menna felags hugburð millum starvsfólk og kundar.

Við útbúgving úr Føroya Sparikassa fært tú eisini førleika til at starvast innan aðrar vinnur. Ella tú brúkar útbúgvingina sum lopfjøl til víðari útbúgving. Tó stremba vit sjálvandi eftir, at tú framhaldandi vilt vera á okkara liði, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Sparikassin hevur eisini fleiri tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

Í næmingatíðini ert tú við í próvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi próg. Eisini næmingar, ið taka próg í summar, eru vælkomnir at søkja.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Starvsfólkadeildina, tlf. 348510.

Send umsóknina við avriti av próvskjølum til adressuna niðanfyri, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. mai 2003 kl. 18.00.

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

www.sparikassin.fo
E-mail: starvsfolkadeildin@sparikasssin.fo

FØROYA SPARIKASSI

Føroya Sparikassi hevur 21 deildir kring landið. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Hetta er í tráð við visjón Sparikassans, sum er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum.


# Verkfalsskerd bløð

VERKFALL
*Eirikur Lindenskov*

Verkfallið rakar sum vera man eisini bløðini – og fyrsta teknið um hetta er, at bløðini verða prentað við skerdum síðutali.

Orsøkin er ikki tann, at starvsfólkini á bløðunum eru rakt av verkfalli – men tað er skipaflutningurin og harvið pappírsflutningurin til landið. Tí verður Prentmiðstøðin noydd at spara upp á pappírið.

Soleiðis er Sosialurin í dag einans prentaður í 40 síðum, og verður síðutalið enn meira skert í næstu viku.

Nógv tilfar til blaðið í dag liggur tí eftir, men er tó tókt í Internet Sosialinum www.sosialurin.fo


## Putnam pútan!

**Nú fæst hon eisini í Føroyum.**
**Kom og royn hana, vit bjóða allan peningin aftur innan 30 dagar, um tær ikki dámar pútuna.**



Opið er gerandisdagar kl. 12 - 17

Ergo & Hjálpartól

J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772 • Fartel. 215 778
Teldupost: ergo@post.olivant.fo • Heimasíða: www.ergo.fo